


*Veðrið verður ógvuliga skiftandi á ólavsøku. Seinrapartin ólavsøkudag kunnu vit rokna við mjørka. Mynd: Kalmar*

### *Skiftandi veður á ólavsøku:*

# Sól, regn og mjørki

## *Ólavsøkuaftan kunnu vit rokna við hampuligum veðri, men verri verður ólavsøkudag*

Vit fáa helst ógvuliga skiftandi veður á ólavsøku. Føroyski veðurmaðurin sigur seg rokna við hampuligum veðri í dag, og at sólin kemur fram av og á. Men móti ólavsøkumorgni verður verri. Tá verður brúk fyri regnskjólinum. Seinrapartin kann roknast við mjørka í Havn. Aðrastaðni í landinum kann roknast við sólarglottum, men til tess er ættin ikki til vildar í Havn.

tór.-

# Diatbetes og diabetesfundir

***Hóast diabetes er ein lívshættislig sjúka, sum varar alt lívið, so ber væl til at hava eitt gott lív við góðari heilsu. Fyri at upplýsa og greiða frá sjúkuni skipar Diabetesfelagið fyri 2 fundum við Carsten Vagn-Hansen. Tann fyrri verður í Fuglafirði 1. aug. og hin í Klaksvík 3. aug.***

Tað eru mest børn og ung, sum fáa insulinkrevjandi sukursjúku, sum vanliga verður nevnd typ. 1-diabetes. Fyri at yvirliva má kroppurin dagliga fáa insulin, sum gjølla má tilpassast kosti og rørslu.

Fær ein ov nógv insulin, og blóðsukrið tí verður ov lágt, so er vandi fyri insulinføling, ella tí sum verri er, »insulinsjokki«. Hetta er eisini galdandi, um ein hevur etið ov lítið ella brúkt vøddarnar ov nógv – alt í mun til hvørt annað.

Harafturímóti er tað eisini sera hættisligt at hava ov høgt blóðsukur, tí tá er vandi fyri fylgisjúkum. Ov høgt blóðsukur kemur av ov nógvum mati, ov lítlari rørslu og/ella ov lítlari nøgd av insulini – alt í mun til hvørt annað.

**Mest av typ. 2-diabetes**

Teir flestu diabetikararnir hava typ. 2-diabetes ella »aldursdiabetes«. Næstan hvør 20. føroyingur fær sjúkuna. Hetta slagið varð fyrr hildið at vera »ikki so farligt«, men gransking hesi seinnu árini hevur greitt víst, at hetta kann elva til álvarsamar fylgisjúkur.

Nevnast kunnu m.a. æðrakálking og nervabruni, sum í mongum førum hevur elvt til amputatiónir av beinum, blindni og nýra- og hjartasjúkur.

Tann besti hátturin at fyribyrgja typ. 2-diabetes er at brúka vøddarnar, so ein er í venjing og ansar eftir ikki at blíva ov feitur og fáa yvirvekt.

**Harður kostur**

Tað er ofta hart at hava diabetes, tí hyggjuráð og vitan ganga ofta ímóti ynskjum og ætlanum, og serliga ung kenna seg skerd í mun til onnur.

Tað hevur altíð verið best hjá diabetikarum at liva eitt lív, har dagarnir í mesta mun hava líkst hvørjum øðrum. Hjá typ. 1-diabetikarum við insulinpenni ber væl til at tilpassa insulinið eftir tørvinum, og harvið er eitt fast lívsmynstur ikki so neyðugt. Men hjá øllum diabetikarm er tað ein stórur fyrimunur at liva regluliga.

**Diabetesfundir**

Diabetesfelagið hevur í fleiri ár havt fundir við Carsten Vagn-Hansen. Hesir fundir hava allir verið um summarið, tá Carsten er avloysari hjá kommunulæknunum í Fuglafirði og Gøtu.

Á fundunum verður størsti denturin lagdur á at læra diabetikarar at liva væl við sjúkuni. Carsten Vagn-Hansen hevur sjálvur havt diabetes í mong ár, og hann dugir væl at greiða frá.

Fyrri fundurin verður á Restaurant Munta í Fuglafirði mánakvøldið 1. aug. og hin seinni í kantinuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið 3. august. Báðir fundirnir byrja kl. 19.000 og *øll eru vælkomin*.

# LIONS áhugaverda framsýning um olju

## *Ein partur av framsýningini er um føroyskt oljuvirksemi, og í hesum sambandi hevur Tíðindablaðið Sosialurin latið nakað av tilfari*

LIONS klubbin skipar á ólavsøku fyri áhugaverdari framsýning um oljuvirksemi.

Felagsskapurin, hevur leigað eina liðna framsýning úr Noregi. Á framsýningini verður eisini sýndur norskur sjónvarpsfilmur um oljuvinnu.

Føroyingar hava ikki verið leingi uppi í oljuvinnuni, men nakað er hent, og í hesum sambandi hevur LIONS fingið nakað av tilfari frá føroysku oljufyrisitingini, millum annað nøkur sera áhugaverd kort. Harafturat hevur Tíðindablaðið Sosialurin latið nakað av tilfari til føroyska partin av framsýningini. Serliga myndir, millum annað av yvirtøkuni av undirgundini, frá oljuráðstevnuni, sum var í Føroyum, og myndir eru eisini tá oljuálitið varð latið landsstýrinum. Somuleiðis hevur Sosialurin eisini latið myndatilfar í samband við tá seismikk-skipið Sea Star fyrstu ferð kom á Havnina og fór undir at gera kanningar. Eisini eru myndir frá arbeiðinum í Lopra.

Tíðindablaðið Sosialurin hevur seinastu árini gjørt nógv burtur úr skriving um oljuvinnu, undirgrund og marknaósemjuna við bretar. Alt hetta tilfarið hevur blaðið savnað í ein sokallaðan oljupakka.

LIONS-framsýningin er í Havnar Klubba, og er opin frá í dag til og við sunnudagin frá klokkan 14 til 19. Sunnudagin letur framsýningin tó upp klokkan 16.

tór.-



*Sea Star, sum í løtum ger seismiskar kanningar við Føroyar*